# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kaj Tausen í Hovi** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hovs kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Kaj kunnu lata Føroysku Sjómanskirkjuni eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

**Sjúrður Hentze í Hovi** andaðist týskvøldið, 67 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jógvan Durhuus**, vanliga nevndur Agga, andaðist í heiminum í Vestmanna týsdagin, 58 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Vilborg Vestergaard** fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 27. mars kl. 13. Tey ið vilja minnast Vilborg, kunnu lata Eldrasambýlinum í Hvalba eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Kurt Hansen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum páskadag, 72 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 27. mars klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin 28. mars klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Kurt, kunnu lata Lions Club Tórshavn eina peningagávu til vælgerðandi endamál. Konta í Eik.

# Evangelisk fundarøð í Eysturoynni

Frá sunnukvøldi 30. mars til sunnukvøld 6. apríl verður ein evangelisk fundarøð í Eysturoynni undir heitinum: "Frelsa, friður og frælsi í Kristusi". Fyrst verða fundir í Filadelfia í Gøtu – frá sunnukvøldi til hóskvøld. Síðani verður farið í studentaskúlahøllina á Kambsdali, har fundir verða frá fríggjakvøldi til sunnukvøld. Fundirnir bæði sunnukvøldini verða kl. 18, allir hinir kl. 20.

Svenning av Lofti, evangelistur, verður høvuðstalari á hesum fundum og heldur fundirnar saman við Páll á Lakjuni og Sveini Petersen, sum fara at taka sær av fundar- og sangleiðslu.

Sangløtur í studentaskúlahøllini á Kambsdali

Fundirnir í studentaskúlahøllini á Kambsdali verða skipaðir sum sangløtur. Har verður nógvur góður sangur – bæði felagssangur og við fleiri góðum sangarum. Fríggjakvøldið fara Jóan Magnus Olsen og Durita Mohr Jacobsen, sum býr á Kambsdali, at syngja. Leygarkvøldið syngur eitt manskór úr Ebenezer í Havn og sunnukvøldið fer Siloakórið at syngja. Í Filadelfia fara Kristina Bærendsen, Bárður á Lakjuni, Kai Meyer, Svein Petersen o.o. at syngja. Svenning av Lofti endar øll kvøldini við einum evangeliskum boðskapi.



*Svenning av Lofti*

Skeið við heitinum »Fýra gudsmenn í Gamla Testamenti«.

Eisini verður eitt skeið leygardagin 5. apríl í Filadelfia í Gøtu. Tá fer Páll á Lakjuni at hava fýra fyrilestrar, ið hann nevnir »Fýra gudsmenn í Gamla Testamenti«. Teir fýra gudsmenninir eru Kaleb, Asa, Ezra og Haggai. Og hóast hetta eru menn, ið livdu fyri 3-4000 árum síðani, hava teir ein viðkomandi boðskap at bera okkum í dag. Skeiðið verður frá kl. 13.30 til kl. 17. Øll eru vælkomin. Tað er ikki neyðugt at tekna seg, og skeiðið er ókeypis.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Kurt Hansen**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum páskadag,
72 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
hósdagin 27. mars kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
fríggjadagin 28. mars kl. 13.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kirstin**
**Ann og Lis**

---

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæra mamma, omma og langomma

**Vanja Seyer Skaalum**
Hvalba

andaðist og fór til gravar.
Tøkk til starvsfólkið á B7 fyri umsorgan og hjálp.
Tøkk til Símun, prest í Hvalba, fyri vælvald
og troystandi orð, til sangarar og allar kirkjutænarar.
Tøkk fyri blómur, heilsanir og gávur til
Hvalbiar Kirkju.
Ein stór tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Og ein serstøk tøkk til Oddbjørg, Páll og Ingibjørg
fyri tykkara trúfesti og hjálp.
Hjartans tøkk til øll tykkum, sum fylgdu mammu til
hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Døturnar**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Magnus Pauli Joensen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Takk til tykkum, sum høvdu umsorgan fyri honum,
meðan hann var sjúkur, og fyri góða røkt ta
seinastu tíðina á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Ein serlig tøkk til Sonju Klein, prest, fyri vøkur og
troystarrík orð eins og til sangarar og tónleikara,
sum veittu okkum ugga í sorgini.
Eisini takka vit tykkum øllum, sum so dyggiliga
stuðlaðu okkum, sýndu samkenslu og hjálptu til
við jarðarferðini og ervinum, og somuleiðis øllum
tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta
hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Dagny,**
**Georg, Óla Jákup, Annika og Bjørg**

---

### Dagurin

**28. mars. Eustachius**, deyður umleið ár 625. Abbati í kleystrinum Luxeuil í Fraklandi. Victor Danielsen varð føddur hendan dagin í 1894.

Sosialurin -har tað hendir